# Stýrisfundarbók FKF

## 18-02-2011 / 3

*Fundarstað:* Hotel Hafnia

*Fundur byrjar kl:* 14:00

*Fundur lokin kl:* 17:00

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Erik Davidsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | Avboð vegna sjúku |
| Dánjal Jákup Jakobsen | Avboð vegna sjúku |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 15**

FKF Jour. nr: 09-018

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Heilsuútbúgvingarráð, tiltakslimur

Málslýsing: Í telduposti dagf. 8. februar, heitir MMR á felagið at tilnevna tiltakslim til heilsuútbúgvingarráðið.

Við støði í § 2, stk. 3 í kunngerð um útbúgvingarráð fyri heilsuútbúgvingarnar verður Føroya Kommunufelag við hesum biðin um at senda Mentamálaráðnum uppskot um tiltakslim til formanssessin í útbúgvingarráðnum.

Fundarsamtykt: Asbjørn Djurhuus.

*Støða: Avgreitt við telduposti 3. mars til MMR.*

---

**Fundarmál nr: 16**

FKF Jour. nr: 09-137

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Fólkaskúlalógin, bygnaðarbroytingar

Málslýsing: Í telduposti dagf. 8. februar, bjóðar MMR felagnum at viðmerkja uppskot um bygnaðarbroytingar. Sí skjal 16.

Fundarsamtykt: nr. 17: Kommunustýrið ger ppskot til bygnað og broytingar í honum.
Nr 18: Skúlastýri er hoyringspartur viðv. nr.17.
Nr. 21: Um verandi játtani, sum ikki fer at dekka í frmtíðini.
Nr. 22: um tøka játtan eftir bygnaðarbroyting.

nr. 19: Atlit til hølistørvin; góðkenning av nýbygging. Uppskotið (til broyting í §57, stk. 2) gongur ov nær tí kommunala sjálvræðinum.

Svaruppskot frá Karl Olsen lagað til við viðmerkingini.

*Støða: Avgreitt við skrivi 09-137_1.3, 21. februar til MMR.*

---

**Fundarmál nr: 17**

FKF Jour. nr: 09-138

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Skálafjarðartunnelin, lógarbroyting

Málslýsing: Í telduposti dagf. 9. februar, bjóðar IMR felagnum at viðmerkja uppskot til broyting í lóg um Skálafjarðartunnelina. Sí Skjal 17.

Fundarsamtykt: Ongin viðmerking.

*Støða: Avgreitt við skrivi 09-138_1.4, 21. februar til IMR.*

**Fundarmál nr: 18**

FKF Jour. nr: 09-139

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Arbeiðsumhvørvið í kommunuskúlunum

Málslýsing: Boðskriv um skyldur í mun til lógina um arbeiðsumhvørvi. Stýrislimir sum kenna til málið greiða frá. Sí skjal 18.

Fundarsamtykt: Ongin viðmerking.

*Støða: Avgreitt við skrivi 09-139_1.2 til MMR 21. februar.*

**Fundarmál nr: 19**

FKF Jour. nr: 09-140

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Málslýsing: Í telduposti dagf. 15. februar, bjóðar VMR felagnum at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtinslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. Sí skjal 19.

Herindi av verandi lóg. Um ein noktar at gera eftir ávísingin fer viðkomandi í karantenu.

Fundarsamtykt: Ongin viðmerking.

*Støða: Avgreitt við skrivi 09-140_1.2 til VMR 21. februar.*

**Fundarmál nr: 20**

FKF Jour. nr: 09-141

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Arbbeiðsmarknaðurin, bann fyri mismuni orskað av breki

Málslýsing: Í telduposti dagf. 15. februar, bjóðar VMR felagnum at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki. Sí skjal 20.

Fundarsamtykt: Kapitul 3;
Yvirskriftin til kapitlið - samsvarar ikki greinunum í kapilinum.

Ongar viðmerkingar annars.

*Støða: Avgreitt við skrivi 09-141_1.2 til VMR 21. februar.*

---

**Fundarmál nr: 21**

FKF Jour. nr: 09-120

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Innkeyps- og útboðspolitikkur

Málslýsing: At taka upp aftur (mál 64 frá 2010). Málið hevur verið til viðgerðar hjá FK-bólkinum. Viðmerkingar verða lagdar fram á fundinum.

Uppskotið liggur undir hoyringum á fkf.fo.

Fundarsamtykt: Møguleiki eigur at verða at býta útboð upp, so smáar fyritøkur fáa møguleika, at vera við.

Felagið ger í samstarv við limirnar uppskot til kommunalarreglur, út frá einari komandi útboðslóg.

*Støða: Í bíðistøðu.*